Stóran týdning fyri demokratiið

Skúlastýrisvalini mánadagin hava stóran týdning fyri demokratiið, sigur Jákup Simonsen, leiðari á mentamáladeildini hjá Tórshavnar kommunu. Í Havn tykist áhugin fyri skúlastýrisvalinum ikki at vera serliga stórur. Einans ein triðingur av foreldrunum yvirhalt at greiða atkvæði.

Heri á Rógvi

Mánadagin skulu foreldur at børnum, sum ganga í fólkaskúlanum, á val. Veljast skal til skúlastýrini, sum hava avloyst gomlu skúlaráðini. Nógv hevur verið at hoyrt um valini í fjølmiðlunum hesar seinastu vikunar, og hevur prátið serliga snúð seg um páparnar, sum ikki hava netta ringin á fingrunum. Tað hevur vist at vera misnøgd millum manna, um hvussu skal gerast við hesar góðu mennu.

Uttanfyri hývuosstaðin hevur verið boðað frá stórum áhugi fyri skúlastýrisvalinum, meðan áhugin í Havnini ikki tykist at vera serliga stórur. Serliga umfatandi er valið í Tórshavnar kommunu, tí hareru heili átta skúlastýri, sum skulu mannast.

Stýrini

Sjálv stýrini verða, á teimum skúlum, tað ganga fleiri enn 20 nømningar, mannaði av trimum foreldraumboðum, tveimum kommunustýrisumboðum, einum umboði fyri kerarnar og skúlaleiðaran. Tað eru tey try foreldraumboðini, sum skulu veljast mánadagin. Millum hesi try verður formaðurin í høgjum einstakum stýri eisini fumin. Foreldrini kunnu á henda hátt fáa beinleiðis ávirkan á skúlan, har børn teirra ganga. Uppstillingarfundir hava verið hildnir kring landið, og hava foreldur havt møguleikan at gerast valevnir. Eisini hevur verið neyðugt hjá foreldrum at skráseta seg um veljaar. Serliga í Havnini hevur verið lítil áhugi fyri at fáa atkvøðurætt til skúlastýrisvalið.

Uppgávan hjá teimum nyggju skúlastýrunum er nettiliga umfatandi. Skúlastýrini hava fyri so vítt rættiliga stórt vald, og kunnu hesi m.a. gera meginregur fyri undervisingarætlanir skúlans. Eisini gera skúlastýrini tilmæli til landsstýrismannin í mentanarmálum um setan og uppsøgn av starvsfólki á skúlanum. Við nyggju fólkaskúlalógini verður lagt upp til, at arbeitt verður við atliti at tí einstaka nømningínum, og met verður, at foreldrini eiga ein stóran leiklut í hesum sambandinum.

Demokratiið skal fáa ávirkan

Í Tórshavnar kommunu stendur Jákup Simonsen á odda fyri fólkaskúlunum. Hann samskipar virksemi á skúlunum, og hevur eisini staðið fyri at kunna um skúlastýrisvalini. Jákup Simonsen ger vart við, at tað í Tórshavnar skulu veljast átta skúlastýri. Tað er einans í Adventistaskúlanum at einki val verður.

Jákup Simonsen sigur, at teir hava roynt sum frægast at kunna foreldrini um valið mánadagin. Skriv hevur verið sent øllum foreldrum, og eisini hava kunnandi fundir verið hildnir á øllum skúlum. Jákup Simonsen ásannar at áhugin ikki hevur verið serliga stórur, men sigur samstundis, at hetta júr er fyrstu fer at valið er. Aðrenn hevur jú verið valt samstundis sum kommunuvalið.

Jákup Simonsen heldur, at hetta valið er ógvuliga tydningarmikið. Hetta er einasti møguleiki hjá at fáa beinleiðis ávirkan. Jákup sigur viðari, at tað hevur alstóran tydning fyri demokratiið, at so nógv foreldur sum gørligt gera sín ávirkan galdandi. Hann heitir samstundis inniliga á øll foreldur at børnum í fólkaskúlanum um at fara á val. Jákup Simonsen metir, at ein valluttøka omanfyri tey sekstu prosentini er at meta sum eitt gott úrslit.

At undirtøkan til uppstillingarfundinar hevur verið so msiðjógvn, heldur Jákup skyldast, at foreldrini óivað hava misskilt hetta við uppstillingarfundum. Jákup Simonsen sigur, at kommuna hevur gjørt tað, sum hon kann, og nú er bert eftir at vóna, at undirtøkan verður góð. Í Tórshavnar kommunu fyrigongur valið á skúlunum millum kl. 14 og 20.

Lítil áhugi

Kommunuskúlin er millum stórstu skúlamar í Tórshavnar kommunu. Á skúlanum eru omanfyri 500 nømningar. Hanus Joensen, skúlastjóri, sigur, at undirtøkan til uppstillingarfundinnar hevur verið stak vánalig. Tólv valevni eru til skúlastýrið fyri Kommunuskúlan, og hetta heldur Hanus Joensen vera á góðari leið, tí tað eru einans tríðjatal, ið skulu veljast. Tað, sum kanska er meira tankavekjandi, er, at útav umleið túsund foreldrum, so eru tað einans 320, sum havi latið seg skráset sum veljarar. Hanus Joensen heldur hetta tal vera alt ov lágt, og leggur aftur at, at skúlastýrið hevur stóran tydning, tí hetta er tað organið, sum skal styra skúlanum.

Hanus Joensen heldur samstundis, at Skúlaráðið hevur virka avbera vøl, men heldur samstundis, at henda nyggjan skipanin tykist at kunna fara at virka minst líka vel.

Ólag á heimasíðum hjá Føroya Tele

Síðani mikudagin hava ivisar heimasíður, ið Føroya Tele tekur sær av, ikki verið at seð

TØKNI

Mikudagin seinnapartin kom ólag í hjá Føroya Tele. Tropulleikar hava verið við sokallaðu web-hotellunum, har heimasíður hava innivist.

Sum skilst, er okkurt tól gingið fyri, so ávísar síður ikki hava verið at sæð. Millum annað hevur heimasíðan hjá Føroya Arbeiðsarfelag ikki virkað. Felagið hevur annars havt virkna og vel vitjaða kunningartenastu, síðani verkfallið byrjaði.

Á Føroya Tele hevur verið arbeitt av øllum alvi at fáa nett lag á aftur. Háskvøldið um 23 tíðina vóru síður aftur at siggja, m.a. síðan hjá Føroya Arbeiðsarfelag.

Í skrivandi stund frettist tó frá Føroya Arbeiðsarfelag, at hóast vitjandi siggja síðuna, so eru enn tropulleikar. Tað ber felagnum ikki til at dagføra síðuna ella at leggja tað nyggjasta nyggja út.

Aktuella verkfallsíðan hjá Arbeiðsarfelagnum, og aðrar síður, vóru í skrivandi stund ventaðar at koma aftur; sum friggjadagurin leið. Til ber at vitja Føroya Arbeiðsarfelag á www.fafelag.fo

- do -

BP klárt til at bora í august

OLULEITING

Jan Müller

BP skrivaði í vikuni undir sáttmála við norsku fyritøkuna Smedvig um at leiga heimsins nyggjasta og mest framkomna borskip til sína fyrstu boring við Føroyar í heyst. Talan er um borskipið West Navion, sum í løtuni borar hinumegin markið. Avtalan, sum er uppá 3 mill. pund ella einar 37 mill. kr. er fyri at bora ein brunn. Samtíðis er gjørd optión fyri enn einum brunni. Hetta verður so tann brunnurin,. Sum BP og Shell fara at bora beint hinumegin markið í bretskum økki. BP vónar at kunna finna olju báðumegin markið í heyst og so fara undir at útvikla tveir felt í senn, eitt á føroyskum økki og eitt á bretskum.

Sosialurin skilur, at West Navion verður tekt til føroyska boringina í august. At skipið er stætt í grannalagnum, har tað borar fyri Conoco og BP í løtuni, kann so hava við sær – um so er at boringin her gongur vel – at skipið kann koma í føroyskt økki skjótari og fyrr enn mett. Upprunaliga ætlanin hjá BP var annars at bora um ólavsøkumundið. Nú fáa vit so at siggja, um tann møguleikin stingur seg upp. Bæði hjá BP og hjá Smedvig eru tey vel nøgd við nyggju avtaluna.

Hjá hinum operatørinum, Statoil siga tey at har gongur alt sum ætlað. Bompallurin Sovereign Explorer er eisini í grannalagnum, har borar í Írlandi. Hann kemur so helst í føroyskan sjógv umleið miðjan juni ella stutt eftir tað. Gongst sum ætlað tekur Amerada Hess yvir tann pallin í september. Hetta merkir, at tær triggjar boringarnar í ár verða lidnar í seinnu helvt av oktober ella í byrjan av november.

Logos II stórfingna móttøku

Ørgrynna av smábátum, umframt Brimil við vatnkanónum tóku ímóti, tá trúboðanarskipið Logos II stevndi inn á Havnarvág um 5 tíðina seinnapartin Kr. himmalferðardag.

TRÚÐBOÐARASKIP

Símun Absalonsen

Frá móttøkuni á Vestaru Bryggju í Havn, tá Logos legði at Kr. Himmalferðardag.

Á bryggjuni varð skipað fyri móttøku. Umboð fyri Føroya Landsstýri, Tórshavnar Býráð og aðrir hildu røðu. Skiparin á Logos II nýtti eisini høvi at takka fyri eina óvanliga hjartaliga móttøku. Móttøkurnar eru sera ymiskar tá Logos II á heimshøvunum kemur í fremmanda havn. Skipið hevur upplivað, at atgongd hevur verið noktað í afrikanskari havn, hóast øll formlig loyvi vóru givin frammanundan. Skipið fekk kortini ta ferðina loyvi til at koma í havn, hóast bíðast mátti í meira enn 24 tímar. Til samanberingar man føroyaska móttøkan hava kenst fløvandi.

Einasta tiltak, ið var umborð hósdagin, tá skipið kom, var ein móttøka kl. 20.00 fyri fyrrverandi OMarar. Eini 200 fólk vóru umborð til hesa móttøku. Hetta vóru føroyingar, ið flestallir í styttri ella longri tíð høvdu verið við missiónsfelagsskapinum OM, ið eigur skipini Logos II og Doulos. Í mun til fólkatalið eru Føroya best umboðaða tjóð við OM. Á móttøkuni hóskvøldið varð greitt frá um virksemið hjá OM í dag og m.a. um framtíðarætlanir hjá felagsskapinum.

Fríggjadagin byrjaðu so tiltøkini, ið vera skulu umborð. Smb. skránna skuldi tiltak vera fyri børn kl. 14 og ungdómskvøld kl. 20. Fyrireikararnir siga, at áhugin fyri vitjanini tykist at vera sera stórur. Fleiri skúlar hava tikið av tilboðnum at vitja umborð, og bólkar frá manningini fara at luttaka við ymiskum tiltøkum í landi, umframt at tey eru boðin at vitja ymiskar samkomur.

Stórt sjálvboðið arbeiði er eisini frá føroyskari síðu gjørt til tess at leggja vitjanina til rættis. Fyrireikararnir hava eisini lagt dent á at vísa føroyskt gestablíðni. Fríggjakvøldið kl. 18 varð øll manningin, ið telur 200, boðin til døgurða í føroyskum privatheimum. Ein persónur, ið hevur siglt við OM skipinum "Doulos", hevur samskipað tiltakið og hevur hann fingið umleið 45 familjur at taka sær av gestunum.

Logos II hevur eina stóra bókasølu umborð, ið høvi verður at vitja. Her fáast bæði kristiligar bókmentir, umframt fakbøkur innan t.d. útbúgving. Mong minnast eisini fjølbroyttu bókasøluna, tá Logos I virjaði í 1983.

Tað skipið var annars ikki ókent í Føroyum, av tí at kongaligi grønlendski handilin KGH hevði átt skipið (Umanak) og røkti tað grønlandssigling inntil 1970, tá OM keypti skipið. Í KGH tíðini var skipið mangan á Havnini. Í fimmtiárunum var tørvur á størri skipi og Umanak fekk ein avloysara. Hetta var Hans Hedtoft. Men í minniligi vanlukkuni á Kappanum í januar 1959 fórst Hans Hedtoft við allari manningini, og Umanak gjørdist aftur álitið í samband við grønlandssiglingina. Millum grønlendingar vóru tí nógvar kenslur knýttar at Umanak.

Sum nevnt varð Umanak selt til OM í 1970, og verður skipið í OM høpi umtalað sum Logos I. Sjálvur var eg staddur í Nuuk í 1988, tá tíðindini bórust, at fyrrverandi Umanak hevði rent á ein flúr við Chilensku suðurstrondina, og at skipið stóð ikki at bjarga. Grønlendska útvarpið hevði tá eina sending, ið nevndist "Et nostalgisk tilbageblik, i forbindelse med forhenv. Ms. Umanak´s forlis." Í sendingini varð tosað um søguna hjá skipinum og grønlandssiglingini. Grønlendingar harmaðust vanlukkuna í Suðuramerika, men teir fegnaðust tó um, at einki mannalív fórst. Minnini frá Hans Hedtoft mundu reka framaftur.

OM fekk ein avloysara fyri fyrrverandi KGH skipið, og í hesum døgum vitjar hetta skip í Føroyum. Almenningurin hevur høvi at vitja umborð. Opið er frá kl. 10-22, sunnudag tó frá 14-22. Skipað verður fyri serligum tiltøkum umborð, men av tí at avmarkað pláss er í fundarhølunum er neyðugt at tekna seg til hesi tiltøk. OM skrivstovan á landi, við samskipar og veitir upplýsingar í samband við vitjanina, hevur tlf. 55 55 55. Hvønn dag kl. 18 eru Logos II-tíðindi at hoyra í Lindini.

Hósdagin siglir skipið inn á Runavík, har tað verður liggjandi inntil sunnukvøldið tá vitjanin endar.